LM-003/2023

Fylgiskjal 3.

Saltangará tann 25/07-2023

Hoyringssvar

viðvíkjandi:

Uppskot til løgtingslóg um innflutning, framleiðslu og sølu av rúsdrekka (Rúsdrekkalógin), dagfesting 21.juni 2023, mál 23/04504

Blái Krossur Føroya hevur hettar hoyringssvar:

Blái krossur Føroya tekur ikki undir við at ætlað verður at víðka um møguleikan at selja rúsdrekka.

Lættari atkomuligheit:

Víðka sølugrundarlag er við til at gera atkomu til rúsdrekka lættari enn í galdandi lóg.

Viðka søla við sterkari løgi:

Hendan broyting gevur lættari atkomuligheit til at keypa sterkari sløg (meira enn 5,8 rúmprocent av alkoholi). Tað er ein broyting, sum vit eru sterkt ímóti. Eingin keta er sterkari enn veikasta liði, og vit vilja til eina og hvørja tíð verja okkara mest sárbæru medmenniskju.

Tað stendur í uppskotinum at hóast Rúsdrekkasølan í útgangsstøði hevur einkarætt at selja rúsdrekka, **so kunnu fyritøkur, sum framleiða rúsdrekka í Føroyum,** fáa loyvi frá Loyvisnevndini at selja egna framleiðslu, sum er sterkari enn 5,8%. Hettar er við til at gera atkomuligheitina lættari, og tað talar Blái krossur ímóti.

Vinarliga

Blái Krossur Føroyar

Edva Jacoabsen

Aðalskrivari